## Andrew skoraði ímóti oddaliði

Andrew av Fløtum var aftur á blettinum hetta vikuskiftið, tá hann skoraði í útidystinum hjá Fremad Amager ímóti Køge. Andrew legði Fremad Amager fram um, tá eitt korter var eftir, men teir megnaði ikki at verja leiðsluna. Tá níti minuttir vóru farnir, fekk Køge útjavnandi málið, sum Anders Clausen skoraði.

Hetta kom illa við hjá Fremad Amager, sum roynir at elta oddaliðini. Køge lá undan dystinum fimm stig frammanfyri Fremad Amager, og við sigri høvdu teir bert verið tvey stig aftanfyri Køge, sum nú liggur á triðja plássi.

Andrew av Fløtum er toppskjútti hjá Fremad Amager við níggju málum í hesum kappingarárinum.



## Jónas og teir taptu aftur

Triðja dystin á rað tapti Frem í donsku 1. deild í gjár. Liðið vitjaði í Vejle, og heimaliðið fekk bæði málini, sum komu í dystinum. Frem manglaði onkrar av sínum stuðulsspælarum til dystin, men Jónas Tór Næss var við sum vanligt. Hann spældi allan dystin á høgra bakki, meðan hinir báðir føroysku spælararnir í felagnum ikki komu á vøllin.

B36-B68 2-1 (1-0):

# Bangnir toftamenn

*B36*

*B68*

**Hóast B36 tíðliga í dystinum fekk Fróða Benjaminsen riknan av vølli, so tordi og vildi B68 ov lítið til veruliga at hótta meistararnar**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*Øssur Hansen hevði á vinstra bakki uppgávu at ansa Sylla. Kviki B36-framherjin skeyt eitt mál, men eftir trupla byrjan fekk Øssur tó eitt gott tak á kvika ivorianaranum*
*Mynd: Álvur*

Sum uppflytari á útivølli móti meistarunum var kanska ikki annað enn náttúrligt, at toftamenn høvdu virðing fyri mótstøðuni, tá farið varð á vøllin í Gundadali leygardagin.

Fyrsta góða korterið prógvaði heimaliðið eisini, at gestirnir høvdu alla orsøk at sýna virðing. Ferð eftir ferð varð toftaverjan tagað sundur, og Sylla átti einar tvær 100% kjansir, sum tó vórðu skammiliga misnýttir.

Sami Sylla var tó eisini maðurin, sum fekk heimaáskoðararnar uppfrá, tá hann gav heimaliðnum uppiborna leiðslu. Obi fangaði bóltin í vinstra borði, og bleyta og neyva innleggið varð stútað inn í síðunetið uttan møguleika hjá Tórði Thomsen í B68-málinum.

### Kortini

Sæð burtur frá einum risamøguleika longu í fyrsta minutti, so var ógvuliga avmarkað, hvat gestirnir høvdu at bjóða. Heimaáskoðararnir mundu spakuliga venja seg við tankan um, at hesin dysturin bara skuldi koyrast heim, tá ein tann mest umrødda hendingin í Gundadali leygardagin stakk seg upp.

Dómarin hevði eina ferð áður funnist at Fróða Benjaminsen og Ova Magnussen, sum høvdu hug at togast dekan ov nógv, og brádliga lá Ovi skerflatur í málteiginum. Hvat var hent og ikki, ber illa til at siga, men niðurstøðan hjá dómaranum var greið, og so mátti Fróði finna seg í, at dysturin var liðugur fyri hansara viðkomandi.

Við ellivu móti tíggju átti B68 nú allar fyrimunir at koma aftur í dystin, men tað merkisverda var, at teir als ikki tóktust hava hug at gera nýtslu av hesum. Hóast aftan fyri við einum máli, so hildu teir á við varna stílinum, sum ivaleyst var taktiska uppleggið, og tí slapp B36 merkiliga væl undan løtuni, sum teir vóru í undirtali.

Og tann løtan gjørdist nú heldur ikki so øgiliga long. Tíðliga í seinna hálvleiki fekk Ralph van Dooren sítt seinna gula kort, og so var líka vítt sum sítt hjá B68.

### Paniskt trýst

Tað mundu tey flestu halda vera endin á B68 í hesum dystinum, men spælið var ikki meira enn sett ígongd aftur, tá B68 fekk javnvág í roknskapin. Støðan sá annars ikki serliga vandalig út, men heldur klossur togaði Bárður H. Joensen í Súna Fríða Barbá, og so varð peikað á brotssparksblettin. Brotssparkinum tók Ovi Magnussen sær av, og hóast áskoðararnir enn ikki høvdu gloymt, at hann var atvold til útvísingina hjá Fróða, so var hann ísakaldur, tá bólturin varð sendur í meskarnar.

Við tíggju móti tíggju setti B36 trýst á, men leingi var líkt til, at hetta skuldi verða uttan úrslit. Møguleikarnir vóru annars fleiri í tali, men ikki fyrr enn í 81. minutti fall avgerðin.

Símin Hansen hevur fyrstu dystirnar havt trupult við at sláa til hjá B36, men tá hann langaði retur-bólt í kassan, reyk sjálvsálitið í topp. Seinastu tíggju minuttirnar var hann ikki til at stýra, og ferð eftir ferð bjóðaði hann troyttu toftamonnunum av við bæði frekum fiksum detaljum. Tað eydnaðist tó ikki at økja um leiðsluna, men hóast tað, so mundu teir á heimaliðnum vera so hampuliga nøgdir. Fyrst og fremst, tí stigini komu til høldar, hóast sigurin væl kundi verið meira trivaligur.

Gestirnir hinvegin mundu iðra seg nakað. Sjálvandi er tað keðiligt, tá mál verður skotið ímóti somikið seint í dystinum. Men fyrst og fremst, so mundi talan verið um sjálvsrannsakan, tí við nakað størri dirvi, tá teir spældu í yvirtali, kundi B68 væl fingið størri úrtøku enn tað sama.

## Útvístur

**Fróði Benjaminsen hevur ofta fingið bæði gul og reyð kort frá dómarunum. Men tað man vera sjáldan, at hann kendi tað so órættvíst, sum hann gjørdi tað í Gundadali leygardagin**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hendingin, sum øll tosaðu um í Gundadali leygardagin, mundi vera, tá Fróði Benjaminsen fekk reyða kortið frá Dagfinn OIsen. Miðvallarin hjá B36 og landsliðnum hevur ofta verið í eldinum fyri sítt harða - og kanska ikki altíð eins vakra - spæl, men í nógvar mátar tóktist, sum hevði kortið hesa ferð lítið hald í veruleikanum.

### Fekk ein álboga

Sjálvur helt Fróði eftir dystin, at hann so ikki hevði gjørt nakað, sum var til reytt kort. Eisini hóast hann viðgekk, at hann burdi verið ov royndur spælari til at fara í holt við nakran nærdyst í slíkari støðu. Og tað tóktist í øllum førum, sum dugdi Ovi Magnussen væl at fáa sum mest burturúr, tá hann læt seg detta inni undir toftamálinum.

– Eg fái ein álboga í búkin. Eg skal ikki standa her og siga, at Fróði gjørdi tað við vilja, men tað er so tað, sum hendir, og tí detti eg niður.

Eftir hetta fekk Ovi hópin av rópum, hvørja ferð hann fekk bóltin, og verjuspælarin viðgekk eisini, at hann kanska átti part av uppiborið.

– Eg gjørdi tað kanska ikki betri sjálvur. Tá eg rann inn aftur á vøllin, rætti eg báðar tumlarnar upp móti B36-áskoðarunum, og tað skuldi eg sjálvandi ikki gjørt.

Men ávirkar tað ikki spælið, tá áskoðararnir so støðugt rópa á ein spælara? – Fyri meg ger tað ikki nakað sum helst. Kanska heldur so, at eg verði meira tendraður, og tað var eisini ein orsøk til, at eg vildi taka brotssparkið. Tá fekk eg ein møguleika at svara áskoðarunum aftur, og eg var ongantíð í iva um, at eg fór at skora, sigur Ovi, sum annars harmast um, at teir mistu stig somikið seint í dystinum.

– Tað er altíði harmiligt, tá mál kemur somikið seint. Sjálvur helt eg eisini, at vit høvdu fingið tamarhald á støðuni, eftir at B36 annars hevði trýst nógv. Og eg haldi eisini, at vit út frá hesum áttu eitt stig uppiborið. Teir høvdu kanska bóltin nakað nógv meira, men tá mest stóð á, so skaptu teir tó ikki so øgiliga nógv, segði Ovi



*Fróði Benjaminsen tóktist hava ilt við at skilja, at hann fekk reytt kort*
*Mynd: Álvur*